FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

Fíggjarmálaráðið
Tinganes
Postrúm 2039
100 Tórshavn

Staður: Tórshavn, 13.02.2023
J. nr. (MEGD): 701-2-2023
Ummælistíð: 16.01.2023 til 13.02.2023
J.nr (FMR).: 21/07135

Hoyringarskriv viðvíkjandi
Løgtingslóg
um
almenna talgilda postskipan
(Mín Boks)

MEGD vil fyrst takka fyri høvið at senda hoyringarskriv til nevnda uppskot.

1. MEGD fegnast um, at hendan løgtingslóg fer at byggja á WCAG (Web Content Accessibility Guidelines). Fylgjandi viðmerking stendur at lesa í viðmerkingunum til lógaruppskotið í *endamálið við uppskotinum* (punkti 1.3):

- *Mínboks skal vera brúkaravinarlig og løtt atkomulig hjá teimum, ið hava skerdar førleikar, so sum blind, sjónveik, deyv, tunghoyrd og øðrum. Hetta skal tryggjast við at fylgja altjóða leiðreglunum um atkomu, WCAG (Web Content Accessibility Guidelines).*

2. MEGD vónar, at neyðugt tilfeingi, harundir fígging, verður sett av til at tryggja, at talgilda atkoman áhaldandi verður hildin á hóskandi støði. Her skal havast í huga, at WCAG javnan verður ment og dagført.

3. MEGD vil í hesum høpi gera vart við, at MEGD hevur fingið kunning um, at talgildar skipanir hjá einum ella fleiri almennum stovnum hava annað enn *føroyskt* mál, sum grundarlag. Hetta ger, at hjálpartól hava torført við at týða ymisku málini, eitt nú í sambandi við upplestur hjá fólki, ið hava niðursetta sjón, eru blind, lesiveik ella skriviveik.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

4. Í sama høpi eru fólk, ið bera brek, ymisk, og hava ymisk livikor og umstøður. Tískil er neyðugt at taka atlit til ymiskar bólkar, og at mannagongdir verða tillagaðar ymiska tørvinum, ið er til staðar, fyri at kunna gagnnýta Mínboks. Hetta er umráðandi til tess at tryggja at rættindi teirra, eitt nú til privatlív, verða vird.

5. Uppskotið allýsir í grein 2 hugtakið *atkoma*, sum *tá ongar forðingar eru, ið móttakarin ikki er tann nærmasti at loysa*. MEGD hevur tað fatan, at hugtakið *atkoma* eigur at verða allýst breidri, og ynskið er, at hetta verður tryggjað umvegis aðra lóggávu. Móttakarar, ið bera brek, kunnu, sum kunnugt, hava tørv á stuðli ella hjálpartólum, í sambandi við at nýta Mínboks. Markamótið millum tað, ið móttakarin sjálvur eigur at taka stig til, og tær talgildu skipanir, ið liggja til grundar fyri Mínboks, kunnu neyvan sundurskiljast ein einfaldan hátt, uttan at vandin økist fyri, at atkoman hjá móttakaranum verður avmarkað. Her hevði tað verið ein fyrimunur, helst fyri allar partar, brúkarar hava lættan og góðan møguleika at fráboða, tá ella um avbjóðingar standast, og at somu bólkar verða inndrignir, tá loysnir skulu finnast.

6. MEGD hevur í hesum høpi fyrr gjørt vart við, at avbjóðingar kunnu standast í sambandi við, at talgildar loysnir eru treyt fyri atgongd til talgildar almennar og privatar skipanir hjá fólki, sum eru undir verju. MEGD stúrir fyri, at hesi verða útihýst, tí tey ikki hava talgildan samleikan, og verji teirra ikki kann virka teirra vegna við sínum egna samleika.

7. Fyri nakrar almennar tænastur er ein loysn funnin, har tað inni í einstøku skipanunum er gjørd ein loysn fyri verjar. Men enn er langt eftir á mál: til dømis varð avbjóðandi hjá hesum at fáa koronapass. MEGD hevur ikki dagførda vitan um júst hetta dømi, men roknar við, at støðan helst er lítið broytt á hesum øki. Vandi er sostatt fyri mismuni, og at mannarættindi teirra verða skerd.

8. MEGD vil gera vart við, at dømi eru í øðrum londum um, at avbjóðingar kunnu standast í sambandi við at fólk, ið bera brek, skulu geva samstykki til flytingar, avgreiðslur, samskifti o.a. inni á talgildum skipanum, sum eitt nú Mínboks. Hetta er serliga galdandi fyri fólk, ið hava menningatarn, eru sjónveik, blind ella á annan hátt hava avbjóðingar við samskifti.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

9. Grein 8 í uppskotinum um *teknisk krøv o.tíl.* ásetir, at *Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um nýtslu av almennu talgildu postskipanini, undir hesum teknisk krøv umframt stødd og tal av fílum, sum í mesta lagi kunnu sendast í hvørjari sending.*

   MEGD vil gera vart við, at í verki (praksis) er talgild netatkoma í stóran mun grundað á, at teknisku krøvini í talgildum skipanum eru hóskandi. Teknisku krøvini eiga at taka hóskandi atlit til hjálpartól, hvørs virknaður byggir á at kunna *avlesa* talgildu skipanirnar handan Mínboks.

10. Í hesum høpi ynskir MEGD, at Landsstýrismaðurin tekur viðkomandi feløg og meginfelag upp á ráð í sambandi við at *áseta nærri reglur um nýtslu av almennu talgildu postskipanini, undir hesum tekniskum krøv*. Tað er umráðandi at ummælistíðin er minst 4 vikur, eins og rundskrivið hjá Løgmansskrivstovuni ásetir, tí so fáa umboð fyri feløgini tíð og umstøður at umrøða teknisku krøvini.

11. MEGD fegnast um, at uppskotið sambært 2. kapittuli, punkti 2.8. strembar eftir at verða í samsvari við ST sáttmálan um rættindi hjá teimum, ið bera brek (*Brekrættindasáttmálan*). Samstundis vil MEGD gera vart við, at um hetta mál skal verða rokkið til fulnar, eigur grein 33, stykkir 1-3, í Brekrættindasáttmálanum at verða framd til fulnar her í Føroyum. Hetta merkir millum annað at:

- Brekumboðið er sett á stovn, soleiðis at fólk, ið bera brek, kunnu fáa serkønan stuðul til netatkomu, um tað gerst neyðugt. (Brekrættindasáttmálin, grein 33, stykki 1)

- Samskipandi eindin hjá Landsstýrinum innan brekøkið, har tað er neyðugt, luttekur í málum, ið viðvíkja talgildari atkomu, eitt nú á netinum. (Brekrættindasáttmálin, grein 33, stykki 2)

- Feløg hjá fólki, ið bera brek, og meginfelagið MEGD, verða tikin upp á ráð, um tað gerst neyðugt í málum har týðandi avgerðir skulu takast í sambandi við talgilda atkomu.
  (Brekrættindasáttmálin, grein 33, stykki 3)

12. Kap. 2, punkt 2.12, í uppskotinum lýsir, at *lógaruppskotið inniheldur ikki ásetingar um gjøld*. MEGD stúrir tó fyri, at uppskotið kann áleggja óbeinleiðis eyka gjøld á fólk, ið bera brek. Høvuðsorsøkin til hetta er, at nøkur talgild hjálpartól kunnu verða kostnaðarmikil, bæði at keypa, reka, dagføra og endurnýggja. Hetta kann merkja, at tað

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

gerst fíggjarliga avbjóðandi, bæði hjá almennum myndugleikum og einstaklingum, at velja tey bestu hjálpartólini at brúka á netinum ella talgilt. MEGD ynskir tí, at talgildu tillagingar, ið verða gjørdar til frama fyri fólk, ið bera brek, taka atlit til lívskorini hjá viðkomandi samfelagsbólkum, serliga soleiðis at tað ikki tyngir hesar bólkar fíggjarliga, meira enn aðrir bólkar, ið ikki bera brek.

13. MEGD mælir til at hava grein 2 í altjóða Brekrættindasáttmálanum í huga, tá arbeitt verður við at menna talgilda atkomu. Grein 2 lýsir hugtøk, ið eru viðkomandi fyri talgilda atkomu.

- hugtakið ”samskifti” at skilja sum mál, tekstsýning, blindaskrift [Braille], samskifti við punktskrift og nerting, stórstavaprent, tøkar margmiðlar, skrivligar og ljóðligar hættir, vanligt mál, tekstir, ið fólk lesa upp, snið, ið víkja frá og eru vaksin um, samskiftistól og samskiftishættir, sum eisini fevna um tøka kunningar- og samskiftistøkni;

- hugtakið ”mál” at skilja sum talað mál, teknmál og onnur ikki-talað mál;

- hugtakið ”mismunur grundaður á brek” at skilja sum ein og hvør munur, útihýsing ella avmarking, grundað á brek, sum hevur til endamáls ella sum ávirkan at 4 skaða ella gera til einkis, at fólk við breki javnbjóðis øðrum kunnu viðurkenna, njóta og nýta øll mannarættindi og grundleggandi politisk, búskaparlig, sosial, mentanarlig, borgarlig ella onnur frælsi. Tað fevnir um allan mismun, eisini at fáa noktað rímiligar tillagingar;

- hugtakið ”rímiligar tillagingar” at skilja sum neyðugar og hóskandi broytingar og tillagingar, sum ikki leggja órímiliga stóra ella óneyðuga byrði á, har tað í ávísum førum er neyðugt, til tess at tryggja fólki, ið bera brek, at fáa og brúka øll mannarættindi og grundleggjandi frælsi javnbjóðis øðrum;

- hugtakið ”algilt snið” er at skilja sum snið á vørum, umhvørvi, skipanum og tænastum, sum øll fólk kunnu nýta mest møguligt uttan at tillaginar og serskilt sniði eru neyðug. ”Algilt snið” forðar ikki fyri at útvega hjálpartól til fólk við ávísum breki, tá ið tørvur er á teimum.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

14. MEGD hevði ynskt, at WCAG eisini verður galdandi fyri privatar fyritøkur, harundir peningarstovnar. Tað eru fleiri fólk, ið bera brek, sum til dagligt starvast á netinum. Fyri inntøku, trivnað og lívsgóðsku teirra, hevði tað verið ein greiður fyrimunur, um WCAG varð brúkt allastaðnis á netinum.

Vinaliga vegna MEGD,

Bárður Atlason Ísheim, aðalskrivari

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo